Skipafelagið Føroyar er tað størsta og elsta skipafelagið í Føroyum við umleið 200 starvsfólkum um borð á skipunum og á teimum fýra føroysku deildunum. Skipafelagið varð stovnað í 1919.

Í oktober 2004 løgdu Skipafelagið Føroyar og Eimskipafelag Íslands saman í eitt felag. Skipafelagið Føroyar og Eimskip hava verið marknaðarleiðandi hvør á sínum heimamarknaði í langt áramál.

Í Eimskipafelag Íslands starvast í dag áleið 1.500 starvsfólk við hollum kunnleika til flutning og við góðum sambondum um allan heim. Eimskipafelag Íslands rekur í dag 50 skrivstovur í 15 londum.

Eimskipafelag Íslands er partur av Avion Group, sum er størsta flutningsfyritøka í Íslandi og í Norðuratlantshavi. Avion Group, sum hevur høvuðsmiðstøð í Íslandi, varð nýliga mett at vera hin næstskjótast vaksandi fyritøkan av teimum 500 størstu fyritøkunum í Evropa (Europe's 500).

# Vilt tú seta teg á ovastu rók

í einum av framfýsnastu fyritøkunum í Evropa

Á Skipafelagnum Føroyar hevur Árni Joensen í sløk 30 ár staðið við stýrisvølin, men nú er stundin komin, at Árni ynskir at fáa betri stundir til eisini at røkja onnur áhugamál.

Leitað verður tí eftir einum framfýsnum, ábyrgdarfullum og dugnaligum persóni til starvið sum stjóri í P/F Skipafelagnum Føroyar.

**Starvið**
Stjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni av Skipafelagnum Føroyar við tilvísing til nevndina.

Eitt starv í einum samtaki sum Avion/Eimskip kann fyri tann rætta persónin eisini skapa møguleikar fyri, at hann sleppur at royna seg í altjóða arbeiði, um áhugi er fyri tí.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

**Umsøkjarin**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin:

- hevur hollan ástøðiligan og praktiskan kunnleika til vinnu- og búskaparlig viðurskifti í Føroyum
- hevur góð samstarvsevni og leiðsluroyndir
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- dugir væl at málbera seg í skrift og talu (á føroyskum og enskum)

**Umsóknir**
Umsókn saman við prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til **Rasmussen & Weihe, statsaut. revisorar, postboks 30, FO-110 Tórshavn** í seinasta lagi fríggjadagin 17. mars 2006

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Klaus Rasmussen á telefon (+298) 351 700.

Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

SKIPAFELAGIÐ
Eystara Bryggja · 110 Tórshavn · www.faroeship.fo

**Konfirmantur 2006**



**Kallkyn**
Vágsbotnur • Tel. 31 62 06



## Vallarvørður í Gundadali

Tórshavnar kommuna søkir eftir vallarvørði til ítróttaøkið í Gundadali.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.:**

- at røkja vøllirnar og ítróttaøkið í Gundadali
- at gera umvælingar
- at ljósviðurskiftini eru í lagi
- at halda ítróttaøkið reint og ruddiligt
- at hava umsjón við virkseminum í Gundadali
- at samstarva við aðrar deildir í Tórshavnar kommunu m.a. reinhaldið og húsaumsitingina

**Førleikakrøv**
Søkt verður eftir arbeiðsfólki, sum dugir at arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni.

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Lønin er sambært sáttmála millum Havnar Arbeiðsmannafelag og Havnar Arbeiðsgevarafelag.

**Meiri fæst at vita**
Gjølligari upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jákup Simonsen, mentamálaleiðara, ella Boða Haraldson, býarverkfrøðing, á tlf. 302010.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir og møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. mars 2006. Viðmerkið umsóknina: Vallarvørður.

**Les meira um starvið á www.torshavn.fo/leysstorv**

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

## Zippora og Ramon Bennet úr Jerusalem hava fyrilestrar um jødarnar og Ísrael



Zipporah og Ramon Bennett eru búsitandi í Jerusalem. Hann er rithøvundur, útbúgvin gudfrøðingur, serfrøðingur innan bíbliunnar profeti. Boðskapur hansara er upplýsandi og bergtekur áhoyrarar. Sum jødi og tónasmiður hevur hon skrivað og sett lag til fleiri hebraiskar sangir. Møguleiki er at hoyra tey á hesum støðum:



| | | | |
|---|---|---|---|
| Leygarkvøldið | 4. mars | kl. 20.00 | í kommunuskúlanum í Havn |
| Sunnudagin | 5. mars | kl. 15.00 | í Skúlahøllini í Trongisvági |
| Sunnukvøldið | 5. mars | kl. 20.00 | í Missiónshúsinum "Libanon" í Sørvági |
| Mánadagin | 6. mars | kl. 10.00 | Tíðindafundur í Norðurlandahúsinum |
| Mánakvøldið | 7. mars | kl. 20.00 | í "Filadelfia", Gøtu |
| Týskvøldið | 8. mars | kl. 20.00 | í bygdarhúsinum "Samljóð", Skopun |
| Mikukvøldið | 9. mars | kl. 20.00 | í "Betesda", Klaksvík |

**"Ísraelsfelagið" og felagið "Vinir Ísraels í Føroyum"**

# HÚS Í VÁGI TIL SØLU

Matr.nr. 200e

Húsini eru frá 1986 og sera vælhildin.
Grundøkið er 1004 m².
Húsini eru 100 m² hvør hæddin. Báðar hæddirnar eru innrættaðar.



**Boð undir 900.000 kr. ongan áhuga.**

**Áhugað kunnu ringja tel 22 99 04**
(Ísland: 0035 6921 744 eftir kl. 20.00)